# Uttandura mótasyning í Klaksvík





**Fríggjakvøldið skipaði Klaksvíkar Handilsfelag fyri eini uttandura mótaframsýning í miðbýnum**

MÓTI
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Veðrið var av tí allar fagrasta, tá Klaksvíkar Handilsfelag skipaði fyri uttandura mótasýning í samband við "Open by Night" tiltakið fríggjakvøldið.

Hóast mótasyningin ikki byrjaði fyrr enn klokkan var farin av 19.00, so var sólin enn frammi.

Og heilt fitt av klaksvíkingum nýttu hetta kvøldið høvi til at fáa eitt lítið innlit í, hvat mótin hevur at bjóða okkum, nú várið nærkast.

Ein stórur lastbilur var stillaður í miðbýnum, og í hesum sama bili gingu modellirnar aftur og fram, íklæddar tað nýggjasta nýggja.

Hví Handilsfelagið valdi at lata ein ljótan lastbil misprýða mótasýningina, ístaðin fyri heldur at latið modellirnar gingi undir opnum himmali, kunnu vit bert gita um.

Men hetta sýntist ikki at ávirka fólkini, ið vóru komin saman um nýggja mótan. Bæði ung sum gomul stóðu hugtikin og hugdu eftir, hvat handlarnir nú hava at bjóða okkum.

Handlarnir, ið vóru við á sýningini, vóru Cheap & Lunell, Maskulin, Skóhornið og Innkast.

# KÍ-tíðindi frá KÍ

**Í samband við dystin móti B36 gav KÍ eina nýggja leikskrá út. Leikskráin hevur heitið KÍ-Tíðindi, og inniheldur fleiri áhugaverdir greinar um fótbóltsliðini í Klaksvík**

FÓTBÓLTUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Upprunaliga skuldi leikskráin koma út í sambandi við dystin móti Skála, sum av fyrstani tíð var á skránni sunnudagin.

Men vegna verkfallið vóru allir dystirnir fluttir, og KÍ spældi sostatt móti B36 ístaðin.

Tí inniheldur leikskráin hjá KÍ ymsar upplýsingar um liðið av Skála, og á forsíðuni stendur eisini prentað: "Landskappingardystur: KÍ – Skála".

## Náddu tað ikki

Heri Ellingsgaard, nevnarlimur hjá KÍ, greiðir frá, at leikskráin longu var farin til prentingar, tá teir vóru kunnaðir um broytingarnar í hesum leikumfarinum.

Hann heldur sjálvandi, at tað er keðiligt, at leikskráin inniheldur upplýsingar um Skála heldur enn B36, sum KÍ jú spældi ímóti.

- Onnur lið fingu broytt teirra leikskrá í nóg góðari tíð, men leikskráin hjá KÍ er so umfatandi og stór, at vit ikki náddu tað, sigur hann.

Harumframt heldur hann eisini, at broytingar í leikumføriunm koma illa við, serliga hjá lýsarunum í blaðnum, sum jú gjalda ein stóran part av leikskránni.

## Áhugaverdar greinar

Men hóast leikskráin er framleidd í samband við dystin móti Skála, so inniheldur hon eisini áhugaverdar greinar um fleiri av KÍ-liðnum.

Millum annað er ein grein at finna um KÍ-kvinnurnar, sum aftur í ár stendur í boði at luttaka í Europa Cup kappingini.

Í greinini sigur Malena Josephsen, at kvinnurnar halda tað verða órættvíst, at tær sjálvar skulu útvega alla fíggingina í sambandi við luttøkuna, tá menninir fáa alt fíggjað frá UEFA.

Eisini heimasíðan hjá KÍ, www.ki-klaksvík.fo, fær umrøðu í blaðnum, og fær lesarin her at vita, at heimasíðan við 150 vitjanum um dagin nú er tann mest vitjaða innan føroyskan ítrótt.

Leikskráin er áljóðandi 30 síður, og fæst til keyps í Statoil.


**Tosa í frítíðini ...**
Til tín, ið tosar mest í frítíðini



| | vanligt hald | GSM FRÍTÍÐ |
|---|---|---|
| Stovning | 250,- | 0,- |
| Mánaðargjald | 115,- | 40,- |
| Samrøður - dag | 1,90 min | 2,25 min |
| Samrøður - kvøld | 1,15 min | 0,75 min |
| SMS-boð | 0,90 | 0,50 |

GSM frítíð kann bert nýtast í Føroyum. Ókeypis stovnan er galdandi frá 1. maj til 30. juni. Fyrivarni verður tikið móti prentvillum.

GSM FRÍTÍÐ
FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum




# Lortaluktur



*Í verkfalsraktu útjaðarøkjunum eru ruskposarnir fullir, og luktur og fluga eru farin at breiða seg um bygdirnar*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Tað er bókstaviliga farið at lukta av lorti ymsastaðni í útjaðaraøkjunum. Ruskposarnir verða ikki tiknir og standa sum freistingar fyri flugu og fugl. Í ringasta føri kann eisini rottan leggjast á teir. Bæði matavfall og blæur eru farin at seta sín dám á luktin ymsastaðni í landinum**

VERKFALL
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Avleiðingarnar a verkfallinum eru rættiliga farnar at merkjast hjá teimum, sum búgva uttan fyri meginøkið á Streymoynni og Eysturoynni.

– Har vita fólk einki um, hvørja ávirkan verkfallið hevur á gerandisdagin hjá teimum, sum búgva í útjaðaranum, er vanlig hugsan manna millum í útjaðarøkjunum.

Í Vágum er eitt nú brennievnið til bilarnar uppi, og friðarligt er á vegunum um dagarnar.

Heldur ikki verða ruskposarnir tiknir, sum vera man, og tað er nakað, sum rættiliga er farið at merkjast.

Dagrøktarmammur, sum hava nógvar blæur, eru reiðiliga farnar at merkja verkfallið, sigur ein dagrøktamamma í Sandavági við Sosialin.

– Sjálv eri eg í teir hepnu støðu, at eg havi fá blæubørn. Og eg havi bilhús, har eg seti posarnar, so tað luktar ikki inni. Men onkur er, sum noyðist at hava teir standandi í kjallaranum, og tað er rættiliga óbehagiligt, sigur hon.

Eisini er onkur, sum hevur verið noydd at seta posarnar útum. Men tað er ein vánalig loysn, tí likkan er eftir øllum, sum stendur óvart, og hon skræðir plastsekkirnar og stroyðir innihaldið kring túnið.

## Av skítanum til

Leiðarin á Føroya Keypssamtøku í Miðvági, Álvur Samuelsen, sigur, at hetta er nakað lort. Bæði so og so. Verkfallið ger, at ikki slepst av við ruskið, og handilsrusk er so mangt.

– Jú, tað er farið at merkjast, sigur Álvur Samuelsen. Vit vóru so heppin, at tað seinasta, sum tikið varð í ruskbilin her vesturi, var ruskbingjan hjá okkum. So hon er ikki vorðin reiðiliga full aftur enn, Men tað verður skjótt. Og so hava vit ein stóran trupulleika, staðfestir hann.

Hann sigur, at tað kemur nógv viðbrekið rusk frá handlinum. Eitt nú spilt frukt og aðrar matvørur, sum lukta illa. Hetta stendur so og freistar flugu og fugl. Og nú lýkkan tykist vera komin, fer hetta ivaleyst at gerast ein stórur trupulleiki.

Eitt annað er allur innpakningurin, sum kemur til handilin. Pappír og papp verður skilt og buntað. Men av tí, at einki sleppur av oynni, verða bunkarnir øgiligir til endans. Ikki er loyvt at kynda bál úti, so tað slepst ikki av við hesar rúgvurnar tann vegin heldur, vísir hann á.

Annars sigur Álvur Samuelsen, at tey í Keypssamtøkuni hava verið rímiliga heppin soleiðis, at tey fáa sína vøru við Skipafelagnum frá FDB í Danmark. Skipafelagsbáturin kemur so til Miðvágs at skipa upp, men tað er nakað seinni, enn tá alt varð skipað upp í Havn og flutt vestur við bilum.

– Tá høvdu vit vøruna her vesturi seinnapart mánadag, Men nú verður tað so ikki fyrr enn í fyrsta lagi týsdag, sigur Álvur Samuelsen. Men av innanoyggja farmi tekur hann einki við.

Ein annar trupulleiki, sum rakar keypssamtøkuna er, at einki brennievni er at fáa til bilarnar í Vágum.

– Fólk, sum keypa frá okkum, eru fólk, sum koma við bili. Og tað fer so aftur at ávirka handilin, sigur leiðarin á Føroya Keypssamtøku í Miðvági.

Men tað, sum verri kann verða, sigur Álvur Samuelsen, er, at tað kann standast heilsuvandi av hesum ruskinum, sum hópar seg upp. Spiltur matur í rúgvum er ikki at spæla við, og í ringasta føri kann tað so henda, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan kemur uppí, og hon hevur rætt il at steingja handilin, verður tað hildið neyðugt.

– Tað er nógv meira átrokandi hjá politikarunum at fáa endað hetta verkfallið enn at gera nakra nýggja samgongu, heldur Álvur Samuelsen, leiðari á Føroya Keypssamtøku í Miðvági.

## Óvirðiligt

Borgarstjóri í Sørvági, Eivind Jacobsen, sigur, at verkfallið fær onga ordiliga effekt, so leingi tað bara er útjaðarin, sum raktur verður. Og tað er tað hvørja ferð, leggur hann aftuat.

Hann vísir á, at tað er undir alt sømuligt mark, at eitt nú sjúkraflutningurin skal verða lagdur soleiðis fram til almenna skoðan, sum hann verður um Vestmannasund í løtuni. Tað er beinleiðis óanstendugt, heldur hann.

Hann undrast á, at vinnulívið ikki ger meira um seg, tí vinnan í Vágum missir heilt nógvar pengar av støðuni sum er.

– Sjálvandi er tað óløgligt at steingja vegirnar av ella gera líknandi tiltøk. Og tað, sum gjørt verður, eigur at vera løgligt, leggur hann dent á. Men tað ber heldur ikki til at blíva við, sum støðan er, tí hon fer bara at versna fyri okkum, sigur hann.

Eivind Jacobsen leggur dent á, at tiltøk eiga at verða sett í verk, og tey skulu vera av slíkum slag, at tey raka hart. Tað, sum gjørt verður, skal hugsast væl ígjøgnum, og so eigur at verða hildið á, til endi fæst á verkfallinum.

– Tey, sum ábyrgdina hava av støðuni, skulu rakast so meint, at tey veruliga vita av tí, sigur borgarstjórin í Sørvági, sum eins og onnur ósek fólk í útjaðaranum er farin at ilskast um at standa fyri skotum, hvørja ferð ein ósemja er í landinum.